# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tá flogskiparin sigur, at okkurt er galið við flogfarinum, kannar tú, at trygdarbeltið er spent*
*Barrack Obama*

# Samd um at skerja CO2-útlátið



*Tey plantaðu hvør sítt træ í Japan. Frá vinstru Gordon Brown, Angela Merkel, George W. Bush, Yasuo Fukuda og Nicolas Sarkozy*

**Fyri fyrstu ferð hevur USA skrivað undir eina bindandi avtalu um at skerja CO2-útlátið**

Prísurin á olju og prísurin á matvørum standa ovast á dagsskránni hjá leiðarunum í heimsins størstu ídnaðarlondum, sum halda fund í Japan í hesum døgum. Japansku vertirnir løgdu seg tó eftir at fáa eina bindandi avtalu um at skerja CO2-útlátið, og fyri fyrstu ferð eydnaðist tað at fáa USA at skriva undir eina bindandi avtalu av hesum slagnum.

Tað er ikki heilt greitt, um USA hevur lagt treytir við fyri at góðtaka avtaluna, men George W. Bush, forseti, hevur fyrr sagt, at USA fer ikki at binda seg til at skerja CO2-útlátið, uttan at Kina og India gera tað sama.

Fyri at vísa ein góðan vilja ímóti náttúruni og umhvørvinum plantaðu teir átta ríkis- og stjórnarleiðararnir hvør sítt træ á japonsku oynni Hokkaido.

# Republikanarin Bob Barr kann tryggja Obama sigurin

**Minni enn so allir amerikanarar vita, hvør Bob Barr er, men sum forsetavalevni kann hann vinna floksfelaga sínum John McCain neisur og kanska tryggja mótstøðumanni hansara forsetasessin**

Bob Barr umboðaði republikanska flokkin í Kongressini til fyri tveimum árum síðani, tá hann valdi at fara upp í tann lítla libertarianska flokkin. Har hevur hann veruliga gjørt um seg og hevur vunnið sær støðugt størri ávirkan og undirtøku. Nakrar fáar dagar undan floksfundinum í mai kunngjørdi hann, at hann ætlaði sær at stilla upp sum forsetavalevni hjá flokkinum, og aftanáseksatkvøðugreiðslur varð hann góðkendur sum forsetavalevni.

Samanborin við teir báðar stóru flokkarnar í USA, demokratarnar og republikanararnar, er libertarianski flokkurin lítil og kanska meiri ein rørsla enn ein flokkur. Tí hevur Bob Barr ongan livandi møguleika á forsetavalinum í heyst.

Men hann kann fáa so mikið av atkvøðum, at tað kann ávirka úrslitið av kappingini millum Barrack Obama og John McCain í teimum statunum, har munurin millum teir báðar er litil. Taparin í hesum føri verður John Mccain.

## Kann gera mun

Higartil hevur tað eydnast Bob Barr at fáa sítt navn á atkvøðuseðlarnar í 30 statum, og fyribils er tað serliga staturin Georgia, sum hevur áhuga. Bob Barr býr í Georgia, og tað kann geva honum lutfalsliga nógvar atkvøður har. Tað er tí ikki av tilvild, at barrack Obama er farin undir eitt átak ímóti republikanarunum í Georgia.

David Plouffe, sum stendur á odda fyri valstríðnum hjá Barrack Obama, sigur við Los Angeles Times, at fær Bob Barr kann saktans fáa fýra prosent av atkvøðunum í Georgia og tvey prosent í teimum flestu av hinum statunum. Hetta samsvarar eisini rættiliga væl við eina meiningakanning hjá sama blaði. Hon vísti, at Bob Barr kann fáa trý prosent á forsetavalinum, og at nógv teir flestu av hansara veljarum komu frá republikanska flokkinum.

Heldur hetta, kann republikanarin Bob Barr geva amerikanarunum ein demokrat í Hvítu Húsini á valinum í heyst.



*Bob Barr var kongresslimur hjá republikanarunum. Nú kann hann kosta teimum forsetasessin*

Mynd: Polfoto

## STUTT SAGT

### Svølgdi rúsevnið



Tað gerst altsamt meiri vanligt, at fólk, sum royna at smugla rúsevni, svølgja tað ella seta tað upp í endatarmin fyri at sleppa ígjøgnum tollin. Vit hava nýliga havt eitt dømi um hetta í Føroyum, og um vikuskiftið hendi tað sama í Íslandi. Tá tollararnir á flogvøllinum í Kefflavík kannaðu ein av ferðamonnunum, vísti tað seg, at hann hevði fjalt rúsevni inni í klæðunum, og at hann eisini hevði svølgt nakað av kokaini.

Hetta var annar tilburðurin av hesum slagnum í Íslandi. Herfyri kom ein niðurlendingur til Íslands, og tað vísti seg, at hann hevði svølgt ikki færri enn 80 smáar pakkar av kokaini.

### Ráðharri letur gøgn

Norski heilsumálaráðharrin, Bjørn Håkon Hansen hevur givið sínum næstu boð um, at skuldi hann doyð í einari vanlukkku, skal sjúkrahúsverkið hava rætt til gøgn hansara, um tørvur er á teimum. Nú um dagarnar hitti ráðharrin eina unga kvinnu, sum hevði fingið gøgn frá einum beiggja sínum, og fundurin við ta ungu kvinnuna hugtók ráðharran so nógv, at hann síðani hevur mælt øllum norðmonnum til at lata seg skráseta sum gøgnveitarar. Eftir at hava vitjað fleiri sjúkrahús er Bjørn Håkon Hansen eisini komin til ta niðurstøðu, at stórur tørvur er á fyribyrgjandi arbeiði, so færri gerast sjúk.